## Avmarkaða tíð í Afghanistan

Heldur afghanska stjórnin, at teir amerikonsku hermenninir verða verandi í Afghanistan, so mistekur hon seg. Tað vóru tey greiðu boðini frá Barack Obama, forseta, tá hann í gjár hevði fund við sínar næstu ráðgevar um støðuna í Afghanistan og ætlanina at senda fleiri hermenn hagar. Aftan á fundin segði ein talsmaður fyri forsetan, at afghanska stjórnin skal taka neyðug stig og vísa, at hon er før fyri at átaka sær tær uppgávur, sum amerikanararnir røkja nú. Tí USA fer bara at hava hermenn í Afghanistan í avmarkaða tíð, endurgav talsmaðurin forsetan fyri at hava sagt.





*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, metir, at tað eru ávísir tingmenn, sum ikki klára pressið av hallinum, sum er á fíggjarlógini, og tí verður stevið ávirkað*

## Fjáltur á ávísum tingmonnum

Hóast John Johannesen í gjár legði eftir uppskotinum hjá Løgmanni at yvirtaka revsimál, so heldur Kaj Leo Johannesen ikki, at Javnaðarflokkurin vil úr samgongu.

– Tá eg tosi við teir, so siga teir seg trívast útmerkað væl, sigur løgmaður.

Hann leggur tó afturat, at tað er ein óstabilitetur í yvirskriftum í løtuni, og tað tosar samgongan um internt.

Eisini heldur hann, at tað er fjáltur á ávísum tingmonnum.

– Tað eru ávísir tingmenn, sum ikki klára pressið av hesum hallinum, sum er á fíggjarlógini, sigur Kaj Leo Johannesen.

John Johannesen heldur ikki, at tað hevur nakað við hann at gera, hvussu stevið í samgonguni er.

– Tað er løgmaður, sum hevur ábyrgdina av samgongustevinum, so tað er hansara uppgáva at fáa tingini upp á pláss, sigur John Johannesen.

Hann leggur afturat, at tað er úr øllum samgonguflokkum, at stevið verður ávirkað.

Til sjálva viðmerkingina hjá John Johannesen um yvirtøkuna av revsirætt, sigur løgmaður seg ikki hava nakra viðmerking, tí hann følir, at John Johannesen trekti væl og virðiliga í land seinni á fundinum.

Tað heldur John Johannesen ikki, tí hann heldur fast við, at tingið ikki skal vera ein stempulmaskina, og tí er flokkurin noyddur at seta spurnartekin við uppskotið um revsirætt, so tað veruliga verður yvirtikið, og ikki endar sum veðurtænastan, sum bara er vorðin til eina eykaútreiðslu.

**-eij**

# Javnaðarfl vil úr samg

**Poul Michelsen, samgongutingmaður, er sannførdur um, at Javnaðarflokkurin ikki longur vil vera í verandi samgongu. – Hendan samgongan er við at vera lokin, heldur Poul Michelsen og sigur, at Javnaðarflokkurin førir valstríð. – Tað kenni eg onki til, sigur John Johannesen**

SAMGONGA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í samgonguskjalinum millum ABC-flokkarnar er skrivað, at revsirættur og sakføraravirksemi skulu yvirtakast.

Í gjár vóru uppskotini at yvirtaka revsirætt og sakføraravirksemi, sum vórðu borið í Løgtingið av Løgmanni, viðgjørt.

Rættiliga tíðliga í viðgerðini byrjaði politiski leiðarin á tingi fyri Javnaðarflokkin, John Johannesen, at seta spurnartekin við, um tað er rætt at yvirtaka hesi málsøki í hesum tíðum, tá almannaverk, heilsuverk og skúlaverk mangla pening, tí at tíðirnar ikki eru so góðar.

Hetta fekk øði í Poul Michelsen, samgongutingmann úr Fólkaflokkinum.

– Eg kundi byrja við John Johannesen fyrst, og eg haldi at tað byrjar at avspegla seg nakað við, at hendan samgonga er við at vera lokin.

– Tað haldi eg mann kann byrja at síggja í eyguni.

– Tá tilík forbehold vera tikin, og vit tosa um nakrar hundraðtúsund krónur. So byrjar tað at líkjast nøkrum, sum ikki longur hevur botn í einari samgongu, segði Poul Michelsen á tingsins røðarapalli í gjár.

Í uppskotinum stendur, at yvirtøkurnar kosta nakrar hundraðtúsund krónur, og tað er hetta, sum Poul Michelsen var og er óður um, at Javnaðarflokkurin ger til eitt stríð við heilsuverki og almannaverki uppií. Javnaðarflokkurin trýr ikki uppá prísin í uppskotinum, og ivast um tað fer at vera ein verulig yvirtøka.

### Heldur fast við orðini

Og hetta var ikki nakað hann bara segði í einari óðari løtu, tí tá hann seinni verður spurdur, hvussu samgongan hevur tað, er svarið greitt.

– Hon hevur minst 40 gradirs febur. Hon hevur tað ikki gott, heldur hann uppá.

Víðari heldur hann tað vera øgiliga populistiskt, at Javnaðarflokkurin nú skal ivast, um hann stuðlar hesum uppskotinum, sum er í samgonguskjalinum.

– Fyri nakrar hundraðtúsund krónur sær tað út sum,



*Samgongutingmaðurin, Poul Michelsen, heldur ikki, at framferðarhátturin hjá Javnaðarflokkinum kann tulkast øðrvísi, enn at flokkurin ikki vil vera partur av sitandi samgongu*